Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um Gomlurætt, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni við fíggjarmálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvørja ætlan hevur landsstýrið við havnini á Gomlurætt, tá Sandoyartunnilin er liðugur?

Viðmerkingar:

Landsverk hevur ábyrgd av at reka havnina á Gomlurætt, sum varð tikin í nýtslu í 1993 og kostaði 130 mió. kr. at byggja.

Havnin á Gomlurætt verður nýtt av Strandfaraskipum Landsins í sambandi við farleiðirnar í Sandoynna og Hest. Tá Sandoyartunnilin verður liðugur og tikin í nýtslu, er Hestleiðin einsamøll eftir um at nýta Gomlurætt sum samferðsluhavn.

Tórshavnar Havn leigar sum er ein part av havnalagnum til flótibrúgvar til smábátar og atløgubryggju til ferðamannasigling.

Nú nýtslustigið fer at minka so munandi er áhugavert at vita, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur til tess at tryggja, at samfelagið eisini í komandi árum kann fáa ágóðar av havnarlagi og lendi, sum standa mát við íløguna – og við inntrivið, ið gjørt er í lendið.

Á Løgtingi, 13. januar 2021

Heðin Mortensen